# Uppsagnarmálið á Vinnuháskúlanum

## Aftursvar til Jógvan á Lakjuni

FELAGIÐ MASKIN-
MEISTARALÆRARAR
29. sept. 2006

Í Sosialinum mikudagin 27. sept. 2006 er ein grein um Vinnuháskúlan og ætlaðu uppsøgnina av einum lærara. Mentamálaráðharrin roynir at greiða fløkjuna, sum hann og aðalráð hansara hava vavt seg uppí. Hesum kemur hann ikki serliga væl frá. Tí koma vit við hesi frágreiðing:

Grundin til, at málið um fíggjarliga óreglusemið á Maskinmeistaraskúlanum (nú Vinnuháskúlin, VH) kom undan kavi, var ein grein í Oyggjatíðindum 19. mai 2006. Í blaðgreinini roynir leiðsla skúlans: stjórin, varastjórin og fíggjarleiðarin at káva út yvir óskilið. Landsstýrismaðurin biður í somu grein um eina frágreiðing. Tann 20. juni sendir PJ nøkur skjøl, sum hann hevur fingið alment innlit í, til MMR saman við eini frágreiðing. Hesi skjøl prógva, at alt er ikki farið rætt fram. Nú er eldur í skálanum, tí tann 31. mai hevur MMR fingið eina sera tunna frágreiðing við ongum fylgiskjølum frá skúlanum. Stórur munur er á hesum frágreiðingum.

So gongur tíðin, og onki hoyrist. Seinast í august 2006 fer MMR í gongd við málið. Í staðin fyri at kanna málið um óreglusemið nærri, velur MMR at søkja at læraranum, sum hevur sent teimum skjølini.

Fríggjamorgunin 25. august 2006 er fundur á Vinnuháskúlanum millum leiðslu skúlans og Mentamálaráðið (MMR). Fakfelagið hevur biðið um alment innlit í fundarfrágreiðingina frá hesum fundi fyri at fáa at vita, um málið um PJ varð umrøtt. Á fundinum eru: ein embætismaður úr MMR, stjórin á VH og varastjórin, sum las við fullari løn.

Sama dag undirskrivar embætismaðurin úr MMR trý brøv, sum øll snúgva seg um PJ.

Fyrsta brævið er stílað til PJ og ber yvirskriftina "Viðvíkjandi óreglusemi á Maskinmeistara-skúlanum." Í brævinum verður sagt: "*Mentamálaráðið skal hervið boða frá, at avrit av brævi tygara, dagfest 20. juni 2006, verður sent til skúlan, **við boðum um** at taka málið upp saman við tygum.*"

Tá ið Sosialurin skrivar, at MMR "*heitti á læraran um* ...", so er tað ikki rætt.

Annað brævið er stílað til stjóran á Vinnuháskúlanum og hevur yvirskriftina "Viðvíkjandi PJ."

Sagt verður í brævinum: "*Vísandi til teldubræv, dagfest 19. desember 2005, frá Mentamálaráðnum til PJ, við avriti til tygara, vil Mentamálaráðið hervið **heita á tygum** um at taka málið upp til viðgerð saman við PJ.*" Onki verður nevnt í brævinum um nakra "virðiliga loysn," so her fer landsstýrismaðurin skeivur.

Triðja brævið er sent Løgtingsins Umboðsmanni við hesum orðaljóði: "*Vísandi til bræv tygara ... hevur Mentamálaráðið avgjørt ikki at gera fleiri viðmerkingar til málið.*" Tað tykist løgið, at MMR tann 7. juli 2006 biður Umboðsmannin um longda svarfreist til 1. sept., tá ið MMR kortini onki hevur at viðmerkja. Málið, sum Umboðsmaðurin viðger, snýr seg um, at bæði stjórin og MMR noktaðu PJ at arbeiða hálva tíð á skúlanum frá august 2005 og árið út hóast skrivligt tilmæli frá serlækna. Málið varð sent Umboðsmanninum 13. mars 2006, og fellur avgerðin helst um stutta tíð.

Tá ið skúlastjórin tann 1. sept. 2006 kallar PJ inn á skrivstovuna, er ongin ivi um, at stjórin ger eftir boðum úr MMR, tí hann sigur: "*Tá eg fái eitt so alvorligt bræv frá MMR, so noyðist eg at handla.*" Stjórin hevði tá leitað fram teldubrævið frá 19. des. 2005, sum er partur av málinum, ið varð sent Umboðsmanninum 13. mars 2006. Í teldubrævinum skrivar MMR: " *... illoyalitetur kann fáa avleiðingar fyri starvsetan tygara.*"

So hendir tað, at ÚF tann 11. sept. 2006 ber tíðindini um, at Umboðsmaðurin átalar landsstýrismannin, tí hann hevur givið boð um, at 12 lærarar í Hoydølum skulu fáa ávaring. Sama dag er hetta mál lagt út á heimasíðu Umboðsmansins.

Dagin eftir, tann 12. sept. 2006 verður ætlanarskriv um uppsøgn handað PJ á stuttum fundi. Einastu grundgevingar stjórans í skrivinum eru brøvini frá MMR, dagf. 19. des. 2005 og 25. aug. 2006.

Fríggjakvøldið 15. sept. 2006 kl. 18.30 ber ÚF tíðindini um at ein lærari á Vinnuháskúlanum skal sigast úr starvi. Ein tíma seinni fer eitt teldubræv úr MMR út í Tinganes til løgmann, tí løgmaður er kunnaður um málið og hevur biðið um viðmerkingar frá MMR. Nú skrivar MMR: "*Ætlanin við áheitanini frá MMR var, at skúlin og PJ kundu taka málið upp í felag, fyri síðani at finna fram til eina **virðiliga loysn** í málinum. Skrivið frá MMR til Vinnuháskúlan er als ikki ein áheitan á skúlan um at siga PJ úr starvi, og vísast skal eisini á, at skúlin hevur setanarmyndugleikan.*"

Ongin ivi kann vera um, at hetta er ein kúvending í mun til tað, sum MMR áður hevur skrivað og ætlað.

Nú kann so ein og hvør meta um, hvørt MMR hevur virkað sum kærumyndugleiki í hesum starvsfólkamáli, tí sum landsstýrismaðurin sigur: "*Hetta er heldur ikki eitt mál, sum MMR hevur nakað við at gera ... og tí er tað ikki fyrr enn ein møgulig kæra kemur, at vit koma upp í málið.*"

Felagið hevur longu umhugsað at kæra málið til Løgmansskrivstovuna í staðin fyri til MMR, um uppsøgnin verður framd í verki, tí felagið hevur ta áskoðan, at MMR hevur verið alt ov nógv uppi í málinum.

Um landsstýrismaðurin veruliga ynskir, at allur sannleikin kemur fram um møguliga óreglusemið á skúlanum, so átti hann at takkað PJ fyri frágreiðing hansara, dagf. 20. juni 2006. Var hon ikki send MMR og øðrum myndugleikum, so varð málið tagt burtur.

At MMR góðtekur einkisigandi frágreiðing skúlans, dagf. 31. mai 2006, og boðar frá, at "*MMR ger ikki meira við málið* ...", týðir ikki uppá, at MMR vil hava allan sannleikan fram.

Felagið bíðar enn eftir, at ætlanarskrivið um uppsøgn verður tikið aftur, og lærarin fær eina treytaleysa umbering frá leiðslu skúlans og MMR.

# Lívfrøðiligt margfeldi

JENS-KJELD
JENSEN
fuglaútstappari,
Nólsoy



Eg vil fyrst og fremst takka Hergeiri Nielsen fyri hansara sera áhugaverdu og nágreiniligu framløgu av "Uppskot til samtyktar um lívfrøðiligt margfeldi" í Løgtinginum tann 28. sep.

Við tað, at allir flokkar vóru so samdir í at góðtaka uppskotið, eri eg ræddur fyri, at tað ongantíð verður sett í gildi!

Jacob Vestergaard tyktist fyrst vilja hava eina umsiting at virka og síðani seta lívfrøðingar í starv; men hvussu skal ein umsiting kunna fara til verka, um hon ikki hevur nakað at umsita?

Tað allar minsta kravið til eina umsiting er, at hon skal hava eina grundleggjandi vitan til tað lívfrøðiliga margfeldi í Føroyum.

Teir ymisku flokkarnir søgdu mong vøkur orð og høvdu stórar ætlanir um at kanna margfeldi í jørðini, luftini og so framvegis; men eingin tyktist hava nakað ánilsi um, hvat hetta umfatar. Um man veruliga hevur ætlanir um at seta eina tílíka kanning í verk, røkkur 1 millión um árið ikki langt!

Til sammetingar kann eg nevna, at ein av teimum seinastu listunum, eg havi skrivað um margfeldi, viðvíkur hópin (ordenen) Phthiraptera, og til tað havi eg nýtt 1 heilt verkaár – tað er 8 tímar um dagin.

Tað er saktans óneyðugt at skriva, at alt hetta mítt arbeiði er ólønt, og at eg geri tað av berum áhuga. Og hóast eg eri sjálvlærdur innan hetta øki, arbeiði eg ikki seinri enn nakar lívfrøðingur.

Hópurin Phthiraptera er bert ein dropi í havinum av øllum tí lívi, sum enn ikki er skrásett her á landi, og tí er ætlanin um bert at seta 2 lívfrøðingar í starv til at kanna alt tað lívfrøðiliga margfeldi, ikki nær nóg mikið; men hin vegin kunnu vit so sjálvandi siga, at um eini 5-10 ár hava vit helst fingið eina grundleggjandi vitan – sum okkum tørvar í dag – og tað vil verða til gagns fyri einar framtíðar Føroyar.

Jacob Vestergård nevndi eisini møguleikan um eina møguliga umsiting, har bæði politikkarir og kommunur kundu leita sær ráð í ivamálum. Ein tílík umsiting vildi eisini verið tað einsta rætta at sett á stovn, tí í dag er man mest sum sleptur upp á fjall.

Ein góður spurningur til eina tílíka umsiting kundi verið:

Hvussu ber tað til, at vit tann dag í dag enn ikki hava nakra kunngerð, ið krevur, at bæði føroysk og útlendsk skip og bátar SKULU hava rottuskermar á trossunum, so at rottur ikki kunnu ferðast til Føroyar á henda hátt? Og hvussu við flutningi millum oyggjarnar? – har skuldi tað sama sjálvsagt verið galdandi!

Óneyðugt skuldi verið at sagt, at flest onnur lond fyri langari tíð síðani hava sett krøv um brúk av hesum rottuskermum.

Í Føroyum tykist tað næstan, sum um fólk eru rædd um, at "føroyska" rottan skal verða avoydd, og at vit tí mugu royna at halda standin við líka við at innflyta "nýtt blóð"…

Eg endi við at vóna, at "Uppskot til samtyktar um lívfrøðiligt margfeldi" fær eina góða endaliga viðgerð.

# Tann fjalda dagskráin?

GUNNAR K
NATTESTAD



Í Dimmuni bleiv gjørt nógv burtur úr, at ein homosexuellur maður var blivin álopin. Hettar bleiv enn einaferð brúkt til at rættvísgera at vit eiga at fáa eina lógarbroyting í antidiskriminatiónsparagraffini, so at sexuell orientering kemur uppí.

Fyri greinaskrivarin var tað ikki nokk bert at siga at ein maður var blivin bukaður (hesin sami byrjaði sjálvur bardagan), nei her snúði tað seg um ein homesexuellan og tí mátti tann síðan blásast upp; kanska fyri at fáa tað meira áhugavert ella heild einfalt fyri at marknaðarføra egna áskoðan.

Havi aldri hoyrt um, at ein hetrosexuellur er blivin álopin, men gangi út frá at hesi eru offur í stórt sæð øllum øðrum álopum/ barde gum.

Heldur ikki verður gjørt so nógv burtur út at løgreglan eisini var álopin, men teir hava helst ikki verið homosexuellir, so hví kóka nakara suppu burtur úr tíð! Løgreglufólk (eins væl og homosexuell) verða eisini niðurgjørd og enntá álopin bara tí tey eru løgreglufólk, men hví einki um at fáa tey við í antidiskriminatiónsparagraffina? Persónliga trúgvi eg ikki at tað hevði hjálpt, hvørki fyri hesi ella omanfyri nevndu. Vánaligur atburður, sum tann ið verður lýstur í greinini, verður í lítlan mun broyttur við Løgtingslóg, men er nógv heldur ein spurningur um uppæling og hvat okkara menniskja sýn er.

Av tí at eg var við at viðgera uppskoti um at skoyta "sexuella orientering" uppí lógina og talaði ímóti at hettar var gjørt; vil eg koma við hesum viðmerkingum aftrat:

Lat tað standa púra greitt at øll menniskju hava sama virði og hava tí brúk fyri og rætt til at vera vird sum menniskju; eingin omanfyri nakran annan. Men hettar merkir ikki, at ein og hvør lívsstílur er líka góður sum einhvør annar ella at einki er skeivt í hesum heimi.

Eg vóni tí at tað stendur heilt greitt at homosexuell hava akkurát líka nógv virði sum eg sjálvur og at eg ikki kann loyva mær at spilla tey út ella buka tey, heldur enn nakran annan einstakling ella bólk fyri tað.

Líka so greitt skal tað tó eisini standa, at eg haldi at homosexuell praksis er skeiv, móti natúruni og skaðilig fyri menniskja. Hetta vil eg, sum sjálvur eri syndari, hava rætt til at føra fram uttan at blíva stemplaður fyri at hava "homofobi" ella tað ið verri er.

Eg vóni vóni eisini at øll, ið siga seg fylgja Jesusi taka hansara orð í Jóhannus 12; 47 til okkum tá ámint verður um hvat er rætt og skeivt: "*Og um onkur hoyrir orð míni og ikki gevur teimum gætur, tá dømi eg hann ikki; tí at eg eri ikki komin at døma heimin, men at frelsa heimin.*"

Ongin av okkum er syndafríur og tí kunna vit ikki døma, men vit kunna og skula áminna í kærleika og bøn um at Guð við sínum anda vil sannføra okkum um hvussu vit eiga at liva.